


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Ferðavinna (2)



ÓSKAR EIRIKSSON
Fólkaflokkurin

Setti mær fyri at kanna, hvat golfvinnan er fyri nakað, og hvørja fíggjarliga ávirkan, hon gevur.

Heimsins tættastu golfbreytir í mun til fólkatal liggja í Íslandi.

Tað er veruliga óhugsandi har, at tað verður bygt nakað innan ferðavinnu, uttan at atlit verður tikið til, at fólk og ferðafólk fáa atgongd til at spæla golf.

Ísland vinnur fleirsifraðar milliónа upphæddir frá ferðafólki, sum koma til landið at spæla golf.

Hetta er so okkara næsti granni fyri vestan.

Okkara næsti granni fyri eystan er Hetland og Skotland. Á lærda háskúlanum í Glasgow hevur kendi professarin í búskaparfrøði, Ph. Price, roknað seg fram til, at ískoyti til bruttotjóðarúrtøkuna í Skotlandi, sum stavar frá golfvinnuni, liggur ímillim 6 og 8 miljardir Pund sterling. Svarandi til einar 70 – 80 mia. kr.

Tað hevur sjálvsagt tikið teimum ár at fáa hesa vinnu upp at standa. Men tað er uppá tíðina, at vit byrja her á landi eisini.

Kross við Fólkaflokkin. Her virka vit!

Les meira á www.folkaflokkurin.fo

# Kveikjara íverksetarar



RODMUNDUR NIELSEN
valevni Fólkaflokksins á Lista A, sjálvandi!

Tað er av størsta týdningi at samskipa og at gera eitt stað har tú kanst avgreiða øll tíni viðurskiftir so at tú kemur skjótt og lætt í gongd sum sjálvstøðugur vinnurekandi. Skipanin í dag við at renna frá Peri til Pól er ikki sera hugagóð hjá nýggjum eldsálum.

Tað átti at borið til á einum stað í landinum at fingið avgreitt øll viðurskiftir, tá íð farið verður undir eina nýggja vinnu. Her hugsi eg um skráseting av nýggjum felagi, mvg viðurskiftir, handilsloyvi, v-tal og so víðari.

# Skuffandi valfundir í Trongisvági týskvøldi 8.januar



SIGMUND ANDREASEN
Miðflokkurin

Sum tit kanska sóðu og hoyrdu, var onki gjørt við fiskivinnuna, undirritaði royndi undir evninum Bygdamenning at fáa fólki í høllina at tala ella seta spurningar hesum viðvíkjandi, tíðanverri var tað ongin sum hevði naka um hesa vinnu at siga, tað sum mest tosa var um, var gransking, skúlar, orku etc, eg skilji ikki hvat alt hetta skal brúkast til, skal alt vera akademikkarir ella professarir her á landi? Og innflyta fremmanda arbeiðsmegi umborð á skip og virkir ?

Eg sakni eitt útspæl frá politiskari síðu, um fiskivinnuna og hvussu teir ætla at tað skal vera livuligt her á landi í framtíðini, við tí hótta fiskastovninum.

# Fíggjarliga óskilið



JÁKUP PETERSEN
valevni hjá Tjóðveldinum

Síðani henda samgongan tók við hevur gamla búskapar óskilið bert vundið uppá seg, og flokkarnir bjóða seg nú fram til løgtingið við búskaparligum ruðuleika í rygginum.

Í bestu búskaparligu framgongd í Føroya søgu hevur tað ikki eydnast samgonguni, at tryggja føroyska búskapin.

Við einari øktari inntøku til landskassan uppá umleið 1000 milliónir krónur hetta valskeiðið er ikki eydnast samgonguni, at fáa eitt líkinda yvirskot komandi ár.

Harafturat er hallið á gjaldsjavnanum umleið 900 milliónir kr fyri 2007 og væntast, at verða yvir eina milliard í 2008. Landsbankin var tømdur so hann ikki kundi svara sína skyldur. Blást hevur verið á tann sjálberandi búskapin so, at ikki ein króna er løgd til minking av ríkisveitingini, samstundis sum samgongulimir kappast um at koma við ófíggjaðum og óplanløgdum uppskotum sum í dagslegu er komið uppá umleið 1000 millióir kr.

Tjóðveldi vil ein ábyrgdarfullan búskaparpolitikk. Ein varnan og stabiliserandi fíggjarpolitikkur, har sveiggini í búskapinum verða javnað. Langtíðarætlanir og raðfestingar fyri almennu íløgurnar, sum verða settar í mun til annað virksemi í landinum.

Ein skatta- og avgjaldsskipan, har tær breiðastu herðarnar gjalda meira enn tær smalru. Búskapargrunnur Føroya, har ótryggar inntøkur, ið ikki eru varandi grundarlag í búskapinum, verða settar og vardar sum ogn Føroya fólks.

Tjóðbanki Føroya skal tryggja professionella umsiting av landsins ognum og grunnum, gjaldoyrajavna og onnur tiltøk, ið skapa støðufesti í búskapinum.

www.jakupp.fo
www.tjodveldi.fo

# Búskapurin skal stýrast



MAGNI LAKSÁFOSS
Sambandsflokkurin

**Skilagóð búskaparstýring er tað einasta, ið tryggjar vælferðina hjá føroyingum**

Landsbankin og Hagstovan hava staðfest, at bæði landið, kommunurnar og samfelagið sum heild, eru skuldarfríð. Grundarlagið er tí gott at byggja á komandi árini.

Hinvegin hava vit tó fyrr upplivað, hvussu skjótt tað kann ganga galið í Føroyum, um vit ikki taka ábyrgd og stýra búskapinum. Mangar ólukkuligar lagnur komu av vanstýringini í 80'unum.

Vit vita øll, at skilagóð búskaparstýring er tað einasta, sum kann tryggja vælferðina hjá føroyingum. Vit skulu spara upp í góðum tíðum, so virksemi kann skapast, tá tíðirnar gerast verri. Á tann hátt sleppa fólk undan arbeiðsloysi og vanlagnu.

Vit skulu ikki ræðast at taka ópopulerar avgerðir, men halda fast í, at tað er rættast at stýra búskapinum skilagott.

Tíverri hava vit alt ov ofta sæð, at flokkar siga seg vera ábyrgdarfullar, men tá tað kemur til stykkis, bogna teir í kongunum.

Hetta vil Sambandsflokkurin ikki vera við til. Vit eru garanturin fyri, at ábyrgdarfull og skilagóð búskaparstýring skal ráða í Føroya landi.

# Eldur í .................. umhvørvinum!



HEIDI PETERSEN
Tjóðveldi

Skuldi luttaka í orðaskifti á Rás2 um umhvørvið, eldur komi í Norðskálatunnilin, og har sat eg, innisperra í Eysturoynni tað heila kvøld.

Og nú vit tosa um eld, so herja skógareldar kring knøttin og tað gerst alsamt týðiligari at veðurlagsbroytingar eru ávegis í heiminum.

Rakar hetta okkum? Ja, í stóran mun, og tí eiga vit at traðka til og taka altjóða ábyrgd í umhvørvismálum.

**Føroyar slóðarar á umhvørvisøkinum**
Hetta gera vit við at:

Fremja í verki løgtingssamtyktina um Kyoto frumskjalið

Í samstarvi við aðrar tjóðir at seta ein havgranskingardepil á stovn

Bjóða Føroyar fram sum royndaraøki fyri varandi orku, og nýta vatn, vind og aldu orku sum høvuðs menningarøki.

Gerast virkin partur í BALI ætlanini fram móti ST veðurlagsráðstevnuni í Keypmannahavn í 2009, har CO2 útlátið eftir 2012 verður ásett.

Taka lut í altjóða fundum við okkara kunnleika til veðurlag og úrslitum innan havgransking, m.a. í sokallaða Grønlands orðaskiftinum um innlandsísin og hvussu hann bráðnar, sum vera á sumri 2008 og á sumri 2009. ( hetta er partur av BALI ætlanini)

**Tiltøk at seta í verk heima í Føroyum**
Heima í Føroyum skulu ítøkilig stig takast á umhvørvisøkinum m.a. :

Uppskotið um umhvørvisverndarlóg setast í gildi beinan vegin

Seta umhvørvisavgjøld á orkukrevjandi nýtslu, so sum bensin, olju o.a.

Upplýsingarátøk um orkusparing og stuðul til menning av orkusparandi tøkni

Krøv um bjálving og orkusparandi tilfar til alla bygging

Revsing fyri umhvørvisdálking, bæði á sjógvi og á landi

Haldi tíðin er búgvin at fara frá at tosa um umhvørvið, til eisini at tora og vilja handla umhvørvinum, okkum sjálvum og børnum okkara til frama. Tað er tað einasta sum eftir mínum tykki er virðiligt.

X við E
Heidi P

Les meira á
www.tjodveldi.fo/heidi